Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Magnus Rasmussen, landsstýrismaður við umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Lýsingar fyri rúsdrekka

Spurningar:

1. Er tað loyvt at seta lýsingar í føroysku fjølmiðlarnar fyri sølu, skeinking og útflýggjan av rúsdrekka?
2. Er tað loyvt at skriva tíðindi á føroysku portalunum og bløðunum, ella at gera innsløg í útvarpi og sjónvarpi, har sagt verður frá, at eitt nýtt slag av øl ella brennivíni er komið á marknaðin, hvørjum tað smakkar av, í hvørjum sambandi tað hóskar seg best at verða drukkið, hvat tað kostar, og hvussu sterkt tað er?
3. Hvør er ítøkiligi munurin á tíðindum og lýsingum fyri somu framleiðslu?

Viðmerkingar:

§ 19 í rúsdrekkalógini sigur, at øll reklama í føroyskum fjølmiðlum og tíðarritum viðvíkjandi sølu, skeinking og útflýggjan av rúsdrekka er forboðin. Men næstan hvørja ferð tá nakrar fløskur av føroyskum whiskey ella okkurt nýtt slag av øl koma á marknaðin, so stendur tað á portalum og eru tíðindi ella partur av onkrari sending í Kringvarpinum. Tað eru fáar vørur, sum fáa so góða reklamu í tíðindarenslinum hjá miðlunum, sum øl og rúsdrekka. Samtíðis er tað ólógligt at hava lýsingar við somu vørum í somu miðlum. Hetta reisir spurningin, nær tað verður roknað sum lýsing, og um ókeypis lýsingar, ið verða kallaðar tíðindi, eru lógligar, meðan lýsingar við somu vørum, (ið framleiðarin skal gjalda fyri), eru ólógligar.

Á Løgtingi, 7. mars 2022

Helgi Abrahamsen